

# Tíðin kanska komin til vápnahvíld í Miðeystri

**Ísraelski uttanríkisráðharrin, Shimon Peres, heldur, at verður tað friðarligt í Ísrael og teimum palestinsku økjunum teir næstu dagarnar, er kanska rætt at fáa vápnahvíld í lag.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Shimon Peres sigur, at binda partarnir frið einar tveir ella tríggjar dagar afturat, hevði tað ikki verið av leið, at ísraelsmenn og palestinar settust við samráðingarborðið fyri at fáa eina vápnahvíld í lag.

Peres heldur, at vápnahvíldin kann laðast eftir Tenet-ætlanini, sum fyrrverandi CIA-stjórin George Tenet var upphavsmaður til. Sambært Peres kundi ein tílík vápnahvíld samstundis skapt grundarlag fyri víðari samráðingum, sum kundu verið grundaðar á ta sonevndu Mitchell-ætlanina. Sambært hesari ætlanini skal ein vápnahvíld nýtast til at geva pørtunum stundir til at fáa virðing fyri hvør øðrum, so teir veruliga kunnu líta á hvør annan í teimum komandi friðarsamráðingunum.

Bæði ísraelsmenn og palestinar hava alla tíðina sagt, at friðarsamráðingarnar eru meiningsleysar, so leingi partarnir ikki hava álit á hvør øðrum.

Amerikanska stjórnin hevur boðað frá, at semingsmaðurin, Anthony Zinni, fer aftur til Miðeystsurs. Hann vendi aftur til USA fyri fjúrtan døgum síðani, tí einki kom burtur úr semingsroyndini. Shimon Peres er fegin um amerikansku avgerðina, tí amerikansk luttøka hevur sera stóran týdning fyri royndina at fáa varandi frið, sigur hann.

Eisini palestinski leiðarin, Yasser Arafat, er til reiðar at fara undir samráðingar. Arafat segði nýggjársdag, at hann er sinnaður at tosa við Zinni, tá hann kemur aftur til Miðeysturs.


†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Heðin Wardum**
Tórshavn

andaðist í heiminum 30. des. 64 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
fríggjadagin 4. januar kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Konan og børnini**

Tey, ið vilja minnast Heðin kunnu lata eina peningagávu
í Føroya banka, konto 1639341.


# Krevja ómaksgjald fyri at veksla evrur

**Fleiri av teimum stóru handilsketunum í Bretlandi krevja ómaksgjald frá fólki, sum vilja sleppa at rinda við nýggja gjaldoyranum.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Bretland er eins og Danmark og Svøríki ikki við í felags evropeiska gjaldoyrasamstarvinum, sum kom í gildi í hinum tólv ES-londunum á nýggjárinum. Fleiri av teimum kendu bretsku handilsketunum so sum Virgins, Dixons og Marks & Spencer hava tó boðað frá, at fólk kunnu rinda við evrum í teirra handlum.

Men handlarnir krevja ómaksgjald fyri at veksla evruna til bretsk pund. Blaðið The Independent skrivar, at tey, sum rinda við evrum í handlunum hjá Dixons, fáa tvey prosent minni enn tann alment ásetta kursin fyri evruna. Dýrast í so máta er tó bóka- og pappírshandilsketan WH Smith. Har krevja tey átta prosent fyri at veksla evrur til pund, skrivar The Independent.

Nevndarformaðurin í Dixons, Stanley Kalms, er ein av teimum harðastu mótstøðumonnunum ímóti bretskari luttøku í gjaldoyrasamstarvinum, men hann hevur sagt, at ómaksgjaldið í handlunum hjá Dixons hevur einki við hansara egnu áskoðan at gera. Ómaksgjaldið skal bert fíggja tær umsitingarligu útreiðslurnar, sum standast av tí nýggja gjaldoyranum, sigur hann.

Bretski ráðharrin í evropeiskum málum, Peter Hain, bað í gjár stórhandlarnar sleppa kravinum um ómaksgjald. Ráðharrin segði, at ómaksgjaldið er óheppið, og hann segði seg vænta, at tað fer at raka bretsku ferðavinnuna meint, verður tað ikki slept.





# Sunt og samt á B6

**Sjúkrahúsleiðslan noyddist í síðsta enda at svølgja ein kamel, fyri at ein loysn skuldi finnast á trætuni B6. Vandi var fyri, at støðan fór at ganga útyvir sjúklingarnar, sigur sjúkrahúsleiðslan. Ein umfatandi umskipan skal slóa fyri hesari nýggju loysnini**

B6
*Heri á Rógvi*

– Støðan orsakað av hópuppsøgnunum á B6 var nú komin hartil, at vandi var fyri, at hetta gekk útyvir sjúklingarnar.

Tí tók sjúkrahúsleiðslan, sum hevur ábyrgd av rakstrinum á Landssjúkrahúsinum, og Sjúkrasystrafelag Føroya tann 28. desember stig til, at finna eina loysn, sigur Sjúkrahúsleiðslan í tíðindaskrivi í sambandi við, at loysn er funnin á trætuni viðvíkjandi teirri nógv umtalaðu deildini, B6.

Deildin letur eftir ætlan upp aftur hin 7. januar, og tá kunnu sjúklingarnir gleða seg til sunna og góða viðgerð, tí eitt væl mannað lið av sjúkrasystrum tekur ímóti teimum.

1,8 sjúkrasystrar fleiri vera at síggja á deildini frá 7. januar at rokna.

– Loysnin er m.a., at peningur verður lagdur afturat lønarjáttanini hjá B6 svarandi til 1,8 sjúkrasystir, tíðaravmarkað í 6 mánaðir.

Í hesum tíðarskeiðnum ætlar sjúkrahúsleiðslan, saman við starvsfólkinum á medisinska deplinum, at fremja eina umskipan á deplinum við tí endamáli, at tryggja sjúklingunum betri tænastu og starvsfólkinum arbeiðsumstøður, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Hvussu skal so henda umskipan skipast?

– Tað eru arbeiðsbólkar á medisinska deplinum, sum arbeiða við hesi ætlan og skulu koma við tilmæli um eina umskipan av virkseminum á deplinum, sigur Jóanis Erik Køtlum.

Hann sigur víðari, at peningurin til ta 1,8 sjúkrasystrastarvið í 6. mánaðir verður funnin í lønarjáttanini hjá Landssjúkrahúsinum.

Enn eru so ikki allar súðir syftar, men tað røkist fyri einari fastari loysn á trætuni.



*Enn er myrkt á B6, men tað røkist fyri, at nýggja árið fer at hava við sær betri kor fyri starvsfólkið á B6*

# Stríðið var tað vert

**– Eg haldi, at tað eru vit øll, ið hava vunnið við hesum. Stríðið hevur so avgjørt verið tað vert, sigur Ingun Gaardbo, álitisfólk á B6, nú ein broytt og betur mannað deild byrjar at virka 7. januar**

B6

*Heri á Rógvi*

Nú framhaldssøgan um sjúkrasystrarnar, sjúklingarnar og sjúkrahúsleiðsluna eftir øllum at døma er komin at enda, so kennir álitisumboðið fyri sjúkrasystrarnar seg eftir umstøðum rættiliga væl.

– Vit fingu nógv av tí, ið vit settu okkum fyri, og hetta eru vit væl eisini nøgdar við, sigur Ingun Gaardbo, sum hevur verið myndin úteftir fyri tær illa strandaðu sjúkrasystrarnar á B6.

Hon greiðir frá, at teir í fyrstu atløgu settu sær fyri at frá 3,6 fólk afturat, men tær søgdu seg seinni kunna góðtaka 1,8 fólk afturat, og hetta er eisini tað, ið tær hava fingið.

At leiðslan nú eftir øllum at døma ætlar at gera nakrar umskipanir, heldur Ingun Gaardbo eisini vera í lagi, og hetta hevur leiðslan væl eisini heimild til, sigur hon.



*– Tað hevur so avgjørt verið stríðið vert, og vit venda allar aftur til arbeiðis, sigur Ingun Gaardbo*

Nú trætan er loyst, so fara allar sjúkrasystrarnar aftur til arbeiðis 7. januar við góðum móti. Tað, at fleiri fólk verða sett, fær eisini fylgjur á tann hátt, at fleiri starvsfólk vera til heilsurøkt, ístaðinfyri at ringja eftir fólki og annað.

– At vit fáa fleiri fólk, merkir í veruleikanum, at deildin fær enn fleiri fólk enn bert 1,8, tí nú verður ikki neyðugt at hava burturav, sum ringir eftir fólki. Eisini verður tað léttari at arbeiða á B6, soleiðis at tað kunnu væntast færri sjúkradagar, sigur Ingun Gaardbo.

Hon er heldur ikki iva, tá ið vit spyrja hana, um hetta hevur verið alt stríðið vert.

– Tað hevur so avgjørt verið stríðið vert, og vit venda allar aftur til arbeiðis, sigur Ingun Gaardbo.

# Shaggy, Emma og Góður matur úr sjónum

**Amerikanski sangarin Shaggy, Emma'as Blues Band og bókin Góður matur úr sjónum kunnu øll kalla seg ársins fyri árið 2001 í Føroyum**

2001
*Heri á Rógvi*



*Àrsins sangur: Angel hjá Shaggy*



*Ársins fløga: Emma's Blues Band*



*Góður matur : Mest selda bókin: Góður matur úr sjónum*

Tað er ógvuliga vanligt at gera upp, hvør hevur selt mest ella hvør hevur verið best ella... Í nógvum av okkara grannalondum er tað mestsum einki mark fyri, hvat tú ikki kann velja sum ársins. Vit í Føroyum hava kanska ikki so sterkar traditiónir á hesum økinum, men tað meira enn so fyri, at vit kjósan onkran ella okkurt at vera ársins.

## Angel

Ein av teimum, sum ger upp fyri árið 2001 er Heðin Arge í Útvarpi Føroya. Hann hevur sendingina 15 tær bestu hvørt leygarkvøld. Gamlaárskvøld gjørdi hann so upp, hvør tað var, sum hevði fingið flestar atkvøður á listanum fyri tað seinasta árið.

15 tær bestu er mestur eitt slag einum at óalmennum føroyskum hitlista, men talan er ikki um nakran sølulista, sum vit kenna aðrastaðni frá. Heldur er talan meira um eitt slag av Most Wanted, har vanligi lurtarin er tann, sum hevur alt at siga.

Árið 2001 var árið hjá amerikanska sangaranum Shaggy, sum veruliga fekk fótin fyri seg aftur á altjóða tónatindunum kring heimin. Hansara sangur Angel gjørdist best umtókti sangurin fyri 2001, um vit meta eftir 15 tær bestu.

Føroyski bólkurin Týr við teirra útgávu av Orminum Langa vóru ikki langt aftanfyri á einum øðrum plássið, men sum heild var ikki nógv av føroyskum tónum á listanum. Bert tríggir av teimum 15 vóru føroyskir sangir.

Heðin Arge sigur, at sangurin hjá Shaggy er ógvuliga léttur at uppfata, og í nógvar mátar riggar sangurin væl, eitt nú í dansi. Hesin sangurin kann rættiliga kallast fyri eitt kvøðuljóma hitt í útvarpinum, tí hann hevur verið heilt ótrúliga umbiðin.

Sum heild heldur Heðin, at føroyingar hava rættiliga altjóða kendan dám.

–MTV er í veruleikanum tann einasti útlendski miðilin, sum vit móttaka impulsir frá, so tað er fyri tað nógva hesin tónleikurin, sum vinnur fram, og hetta er einamest poppur, sigur Heðin.

Hann leggur afturat, at tað er nógvur góður føroyskur tónleikur, men tað er ikki sovorðið sum sæst ovastu á listanum.

## Emma

Emma Vágoy og hennara Emma'as Blues Band vóru, sambært 3'aranum, mest seljandi tónleikarabólkurin í Føroyum fyri árið 2001. Útlendskir eins og føroyskir bólkar kundu einki gera móti og hennara, sum hava selt eini 2.300 eintøk av fløguni hjá sær, sum kallast fyri Hetta er eisini okkara land.

## Góður matur úr sjónum

Tá vit ringdu fyri at spyrja, hvussu var bókasøluni í farna árið, so varð svarið beinanvegin, at tyngsta bókin á skálini var Góður matur úr sjónum. 5.000 eintøk eru seld av bókini, soleiðis at tað í dag er umleið 1/10 av Føroya fólki, sum hevur eina tílíka bók liggjandi.

Tað vóru næmingar av fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, sum tóku stig til bókina, og hetta vísti seg at vera eitt rættiliga gott hugskot.

Horvin eftir Grækaris Djuruus og Teir tóku land eftir Jógvan Arge eru í hølunum á góða matinum úr sjónum, men kundu tó einki gera við fiskarættirnar. Mest seljandi skaldsøgan gjørdist týðingin av søguni um Annu Frank og hennara dagbøkur.